# Eldraráðið í Tórshavnar kommunu

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



Kanning
Gallup Føroyar
Oktober 2019
Laila Hentze

© GALLUP

# Endamál

- Endamálið við kanningini var at kanna støðuna hjá teimum 60-75 ára gomlu við høvuðsdenti á núverandi og framtíðar bústaðarviðurskifti.
- Harumframt verður í kanningini spurt um, hvørji støð ella tilboð, sum Tórshavnar kommuna onkursvegna varðar av, hesin aldursbólkur vitjar.
- Spurningar um sjálvmetta kropsliga og sálarliga heilsu vórðu eisini settir.
- Áhugavert at vita, hvørjar ábendingar úrslitini góvu okkum.
- Úrslitini geva upplýsandi tilfar til heilsu- og umsorganartænastuna og býarskipanarmyndugleikan hjá Tórshavnar kommunu og øðrum instansum, til dømis Bústøðum.

© GALLUP

# Mannagongd

- Innsavnað tilfar í tíðarskeiðnum 9. – 28. september 2019.
- Landsfólkayvirlitið valdi 800 tilvildarlig fólk umboðandi tey 60-75 ára gomlu, kyn og øki í Tórshavnar kommunu.
- Kunningarskriv og spurningar út við posti, har biðið varð um at svara umvegis netið.
- Tá freistin var farin, leitaðu starvsfólk hjá Gallup Føroyum eftir telefonnumrum á sona.fo og ringdi til teirra, sum ikki høvdu svarað.
- 455 borgarar hava svarað kanningini.
- Svarprosent: 57%

© GALLUP

# Kyn?



| **Total** Graf filtre. | **455** |
|---|---|
| Kvinna | 51,4% |
| Maður | 48,6% |

©

# Aldursbólkar




**Total** Graf filtre. **455**

© GALLUP

# Hjúnastøða?

72,5% av teimum, sum svaraðu, eru gift.




**Total** Graf filtre. **455**

© GALLUP

# Hvar í Tórshavnar kommunu býrt tú?

25,5% av teimum, sum svaraðu, búgva í Vesturbýnum.




**Total** Graf filtre. **455**

© GALLUP

# Hvat slag av bústaði býrt tú í?

- Heili 87% búgva í egnum sethúsum, raðhúsum ella tvíhúsum
- 6,4% búgva í egnari íbúð
- 3,7% búgva í leiguíbúð, meðan 1,1% leiga sethús
- 1,3% búgva inni hjá familju ella øðrum



© GALLUP

# Býrt tú saman við nøkrum? (Til ber at velja fleiri svar)

15,4% búgva einsamøll, meðan restin býr saman við øðrum.




**Total** Graf filtre. **455**

© GALLUP

## Hvussu kundi tú hugsað tær at búð um 10 ár?



© GALLUP

# Hvussu kundi tú hugsað tær at búð um 10 ár?

Sum áður nevnt búgva 87% í egnum húsum. Um fimm ár eru tað 61,5%, sum framvegis ynskja at búgva í egnum húsum. Um 10 ár eru talið fallið niður á 42,2%. Um 10 ár ynskja sostatt nærum helmingurin at hava fingið sær annan bústað, til dømis í íbúð, raðhús ella eldrabúðfelagsskap. Tá spurt verður 10 ár fram er størri áhugi fyri eldrabúðfelagsskapi (8,1%) enn í 5 ára tíðarskeiðnum (2,4%).




© GALLUP

# Kanska íbúð?



© GALLUP

# Um tú skuldi valt at búð í einari íbúð, hvat slag av íbúð, kundi tú helst hugsað tær at flutt inn í?

37,1% kundu hugsað sær eigaraíbúð og 26,2% kundu hugsað sær leiguíbúð, um tey skuldu valt millum ymisk sløg av íbúðum. 9,5% ynskja sær lutaíbúð, meðan 17% ikki eru áhugað í at búgva í íbúð.




**Total** Graf filtre. **423**

©

# Ein spurningur um búfelagsskap. Kundi tú helst hugsa tær at búð...

Um tey spurdu skuldu valt at búð í búfelagsskapi, so høvdu 11,2% hugsað sær, at bara eldri fólk búðu har. 38,2% høvdu hin vegin ynskt at búð saman við fólki í øllum aldri, meðan 32,7% eru ikki áhugað í búfelagsskapi. 17,8% siga seg ikki vita.



**Total** Graf filtre. **455**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Í búfelagsskapi fyri eldri burturav | 11,2% | Nei, ikki áhugað/ur í búfelagsskapi | 32,7% |
| Í blandaðum búfelagsskapi saman við fólki í øllum aldri | 38,2% | Veit ikki, hvussu eg vil búgva í framtíðini | 17,8% |

© GALLUP

## Um tú kundi hugsað tær at búð í búfelagsskapi, hvørji ynskir hevur tú so til felagsøkini? (Til ber at velja fleiri svar)

- 75,2% ynskja grønt øki við terassu, borðum og stólum.
- 64,2% ynskja felagshøli
- 58,6% ynskja eitt høli, sum tey kunnu leiga til familju, sum koma at ferðast.
- 33,9% vildu hava felags vaskikjallara
- 19,5% felagskøk
- 5,9% ynsktu annað, t.d. privatan garð, gott útsýni, møguleikan at velta egið grønmeti og blómur, felags sauna og hitapott, eyka kamar til familju í íbúð, fitness høli, spælipláss, trampolin, fótbóltsvøll.

©

## Hvar í Tórshavnar kommunu kundi tú hugsað tær at búð um 10 ár?



©

# Hvar í Tórshavnar kommunu kundi tú hugsað tær at búð um 10 ár?

Flytførið er ikki stórt. Fólk vilja helst vera búgvandi í økinum, har tey longu búgva. Tó eru nøkur, sum kundu hugsað sær at flutt nærri miðbýnum.




**Total** Graf filtre. **455**

© GALLUP

## Hvørji støð vitjar tú í Tórshavnar kommunu, sum kommunan varar av?



Út við 60% av teimum, sum svara, ganga túrar á lendisgøtunum runt í kommuni.

©

## Hvørji støð vitjar tú í Tórshavnar kommunu, sum kommunan varar av?



27,3% vitja svimjihøllina

Út við 30% brúka Tórsbreyt

© GALLUP

## Hvørji støð vitjar tú í Tórshavnar kommunu, sum kommunan varar av?

- 27,9% vitja Býarbókasavnið
- 25,7% vitja onnur støð
- 20,7% ganga á kvøldskúlanum
- 18,7% íðka í venjingarmiðstøðum
- 4,8% eru í badmintonhøllini til venjing
- 1,8% brúka Boðanesheimið til venjingar/fimleik/samveru
- 14,7% av teimum, sum svaraðu, vitjaðu ongi av nevndu støðum



© GALLUP

## Hvørji støð vitjar tú í Tórshavnar kommunu, sum kommunan varar av?



7,9% vitja Tilhaldið í Tórsgøtu
2,6% vitja Tilhaldið í Kollafirði
0,9% Dagtilhaldið í Nólsoy

© GALLUP

# Á einum stiga frá 1-7, har 1 er sera ring heilsustøða og 7 er sera góð heilsustøða, hvussu metir tú tína egnu kroppsligu heilsustøðu vera?

Samanumtikið hava tey flestu spurdu 60-75 ára gomlu tað gott. Miðaltalið er 5,7.




©

# Á einum stiga frá 1-7, har 1 er sera ring og 7 er sera góð heilsustøða, hvussu metir tú tína egnu sálarligu heilsustøðu vera?

Tey flestu spurdu meta sína sálarligu heilsustøða verða góða ella sera góða. Miðaltalið er 6,4,




**Total** Graf filtre. **455**

© GALLUP

# Hevur tú aðrar inntøkur enn fólkapensjónina og samhaldsfasta?

65% av teimum, sum fáa fólkapensjón og samhaldsfasta, hava aðrar inntøkur afturat, tað kundi til dømis verið pensjón uttanlands ella løn. Út við 35% hava bara fólkapensjónina og samhaldsfasta.



| **Total** Graf filtre. | **327** |
|---|---|
| Ja | 65,1% |
| Nei | 34,9% |
| Fái ikki fólkapensjón og samhaldsfasta | 0,0% |

# Hevur tú tørv á endurvenjingartilboðum (Rehabilitering)?

13% av teimum 60-75 ára gomlu í hesari kaningini hava tørv á endurvenjingartilboðum.



| **Total** Graf filtre. | **455** |
|---|---|
| Ja | 13,0% |
| Nei | 87,0% |

© GALLUP

# Takk fyri



© GALLUP